# Oljufeløg sinnað at vága milliardir uppá oljuboring við Føroyar

*– men tað velst nógv um lisenstreytirnar, føroyingar gera*

Tey stóru og kendu oljufeløgini Statoil, Mobil og Enterprise eru sera áhugað í at fara undir at bora eftir olju í føroysku undirgrundini. Men tey siga við ein munn, at tað enn er ov tíðliga at seta vónir til eina komandi føroyska oljuvinnu. Hetta kann bert staðfestast, tá oljufeløgini hava sett á at bora. Og tað verður í fyrsta lagi um nøkur ár. Hetta velst eisini um, nær føroyska oljufyrisitingin er liðug við lógarkarmin og treytirnar í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfarið, sum sambært álitinum frá Oljuráðleggingarnevndini skal vera í 1996 ella í 97.

Fyri at standa sterkari og betur at fara undir kanningar í einum so heilt ókendum øki sum Føroyar eru, hava hesi oljufeløgini stovnað ein samstarvsbólk undir heitinum »The Atlantic Margin Group«.

Umboð fyri tey trý oljufeløgini hava alla hesa vikuna greitt føroyskum tíðindafólki frá royndum og grundarlagi teirra fyri at fara undir at leita eftir olju við Føroyar.

Feløgini bíða í spenningi eftir, at føroyingar skulu fáa sjálvan lógarkarmin, eitt nú treytir í sambandi við útbjóðing av økjum til oljufeløg, liðnar.

Feløgini eru longu í ferð við at tulka seismisku upptøkurnar frá Western og siga leiðandi jarðfrøðingarnir, sum arbeiða í Keypmannahavn, Stavanger, Aberdeen og í London, at seismiska tilfarið er áhugavert, nú tað ber væl til at »síggja« niður gjøgnum basaltið í støðum.

Oljufeløgini eru sinnað at brúka stórar peningaupphæddir til at leita eftir olju við Føroyar, um tulkingin av seismikkinum gevur tær røttu ábendingarnar – og – og tað er kanska enn meira umráðandi – um føroysku treytirnar til eitt nú avgjøld í sambandi við oljuframleiðslu eru á rímuligum støði. Hetta merkir ikki – skilst á oljufeløgunum – at tey ætla at mergsúgva hvørja krónu burtur úr einum møguligum oljuævintýri. Tvørtur ímóti siga feløgini, at føroyska samfelagið skal hava sín rímuliga ágóða av oljuinntøkunum.



Jan Müller
úr London

Men av tí at oljufeløgini seta sera nógv upp á spæl í einum øki, har vit fyri tað fyrsta einki hava sæð til olju enn og harnæst at umstøðurnar at arbeiða eru torførar, so eiga avgjaldstreytirnar ikki at vera ov tyngjandi. Tað ræður um hjá føroyingum – ynskja vit at fáa oljufeløgini til Føroya – at gera umstøðurnar so attraktivar sum gjørligt. Mong lond royna at fáa oljufeløgini at gera íløgur í oljuleiting, so oljufeløgini velja tey pláss, har tey meta treytirnar at vera mest rímuligar. Sum dømi kann nevnast, at meðan Bretland áður álegði oljufeløgunum at gjalda ein hóp av ymsum skattum og avgjøldum, sum otta fór avstað við einum sera stórum prosentparti av vinninginum, so er hetta nú broytt soleiðis, at oljufeløgini í dag bara gjalda partafelagsskatt, sum er 33%.

Bretska stjórnin hevur tikið hetta stigið fyri at fáa oljufeløgini meira hugað at gera íløgur í leiting eftir olju í eitt nú nýggjum økjum sum tí vestan fyri Hetland.

Tað verður mett at kosta 150 mill. kr. bara at bora eitt hol við Føroyar. Hetta er meira enn tað dupulta av tí teir brúka á øðrum, eitt nú grynri vatni og á veðurbetri økjum.

Tað verður eisini mett í oljuvinnuni, at tað skulu 10 boringar til, áðrenn tú rakar við olju. T.v.s. at feløg skulu kanska risikera 1,5 mia. kr., áðrenn tey gera eitt fund.

So her stendur nógvur peningur upp á spæl. Men tey trý oljufeløgini Statoil, Mobil og Enterprise eru til reiðar at vága hetta, men tað velst so alt um tulkingina av seismikkinum og uppaftur meira av lisenstreytum og lógarkarminum annars.



*Umboð fyri oljusamtakið »Atlantic Margin Group«*

## Fríhavnin nógv at siga fyri oljufeløgini

*Ein fríhavn í Føroyum kann hava sera stóran týdning fyri eina komandi føroyska oljuvinnu*

Tá tað ræður um at gera arbeiði hjá oljufeløgum í sambandi við komandi oljuboring lættari og bíligari, er ein fríhavn ein partur av svarinum.

Phil Sands frá Mobil Oil sigur við Sosialin, at tað er hugaligt at hoyra, at eitt nú Tórshavnar kommuna hevur søkt um loyvi at skipa eina fríhavn.

– Hetta kunnu vit bert fegnast um. Ein fríhavn fer at gera okkara arbeiði nógv lættari. Tá sleppa vit undan nógvari tarnandi umsiting og burokratii. Tað sparir okkum eisini týðandi útreiðslur, sum vit annars skuldu goldið, nú Føroyar eru uttan fyri EU, sigur Phil Sands.

Hann dylur ikki fyri, at oljufeløgini leggja stóran dent á at fáa góðar umstøður at virka undir, tá tey skulu til at gera risastórar íløgur í kanningar og boring í næstu framtíð.


**Lívdin,** Dj. í Gellagøtu 1

**Opið er soleiðis: Mikukvøld frá kl. 20–23, fríggjakvøld og leygarkvøld frá kl. 19.00 til 01.00, og sunnukvøld frá kl. 19.00 til 23.00.**

**Aldursmarkið er 16 ár.**



# FØROYA HANDILSSKÚLI

*Postsmoga 177 - 110 Tórshavn*

## *Vindows*

*95023.1*

*Um nóg stórur áhugi er, skipar STH fyri skeiði í **Windows**.*

*Endamálið við skeiðinum er at læra luttakararnar at nýta funktiónirnar í **Windows** á ein skynsaman hátt.*

*Skeiðið er ætlað teimum, sum hava **Windows**.*

| | |
|---|---|
| ***Tíð:*** | *8 tímar.*<br>*Mánadagin 08. mai 1995*<br>*Mikudagin 10. mai 1995*<br>*Báðar dagar kl. 14.00–17.45.* |
| ***Luttakaratal:*** | *Pláss er fyri 11 fólkum.* |
| ***Stað:*** | *Føroya Handilsskúli í Tórshavn.* |
| ***Skeiðleiðari:*** | *Allan Dresling.* |
| ***Kostnaður:*** | *Kr. 850,00 fyri hvønn, íroknað frálæru, skeiðtilfar og mat.* |

*Fráboðan um luttøku innan 3. mai 1995.*

*Nágreiniligar upplýsingar og tilmeldingarblað fáast á Føroya Handilsskúla í Tórshavn.*

***SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH***

***útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla***